**SEV**
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn

+298 34 68 00
www.sev.fo
sev@sev.fo

# Avtala um leigu av løðistøð

Hesar vanligu treytir áseta treytirnar millum teg sum kunda og SEV ísambandi við leigu av løðistøð frá SEV.
Orðini ”SEV”, ”vit”, ”okkara” vísa til Elfelagið SEV, V-tal. 331538, Landavegur 92, Postsmoga 319, 110 Tórshavn.
Orðini ”Tú”, ”tín” og ”tína” vísa til tín sum kunda, og aðrar persónar, sum tú heftir fyri ella hevur løgfrøðiliga ábyrgd fyri mótvegis okkum.

Avtalugrundarlagið fevnir um bíleggingaroyðublaðið, hesa avtalu, ta til eina og hvørja tíð galdandi og á heimasíðu okkara kunngjørdu gjaldskrá fyri leigu av løðistøð, sjálvvirkandi kvittan okkara, váttan tína fyri móttøku av sjálvvirkandi kvittan okkara, umframt fráboðan okkara um, at umsókn tín er viðgjørd og góðkend.

Orðingar sum ”gjaldast”, ”skriva rokning”, ”avrokna” o.l. sum viðvíkja gjaldi, vísa til ta til hvørja tíð galdandi gjaldskrá viðvíkjandi leigu av løðistøð.

## 1. Partur - Ger av og uppsøgn av avtalu

### 1. Avtalan

1.1. Avtalan er bindandi fyri teg, tá tú umvegis heimasíðu okkara hevur útfylt og latið okkum bíleggingaroyðublaðið um leigu av løðistøð. Tú fært sendandi sjálvvirkandi kvittan í telduposti sum váttan um, at vit hava móttikið bíleggingaroyðublaðið.

1.2 Avtalan er bindandi fyri okkum, tá vit hava sent tær fráboðan um, at vit hava viðgjørt og góðkent tína umsókn um at leiga løðistøð frá okkum.

1.3 Avtalan kann sigast upp skrivliga av hvørjum parti sær við 1 mánaða uppsagnartíð til tann síðsta í mánaðinum. Í sambandi við uppsøgn skalt tú umvegis heimasíðu okkara fylla út og lata inn oyðublaðið ”Uppsøgn av avtalu um leigu av løðistøð”

1.4. Við uppsøgn av Avtaluni, skal kundin skipa fyri og gjalda fyri, at løggildur elinnleggjari tekur niður løðistøð og um henda er fevnd av grøna málara, eisini tilhoyrandi elinnlegging í samráð við okkum, og lata okkum løðistøðina aftur í góðum standi frásæð vanligt slit og elli.
Letur tú okkum ikki løðistøðina aftur sum nevnt, hava vit rætt til at fyriskipa, at hon verður tikin niður fyri tína rokning. Tú hevur skyldu til at syrgja fyri ótarnaðari atgongd til løðistøðina.

1.5 Løðistøðin er ogn hjá okkum, og tú leigar hesa sí eisini 3. part, pkt 9, niðanfyri

1.6 Ert tú privatkundi kanst tú iðra tína bílegging við at geva okkum fráboðan um hetta í seinasta lagi 14 dagar eftir móttøku av sjálvvirkandi kvittan okkara fyri móttøku av bíleggingaroyðu-blaðnum. Hevur tú verið á skrivstovuni hjá SEV og framt bíleggingina, hevur tú ongan iðranarætt. Um tú í sambandi við bíleggingina hevur góðtikið, at vit útflýggja løðistøðina, áðrenn iðranarfreistin er runnin, fellur iðranarætturin burtur, tá løðistøðin verður útflýggjað.
Um tú gert iðranarættin galdandi, skal løðistøðin latast okkum aftur í sama standi sum við útflýggjan. Tú rindar møguligan kostnað í hesum sambandi. Vinnurekandi hava ongan iðranarrætt

## 2. Bústaðarbroyting

2.1. Skiftir tú bústað, er neyðugt at søkja av nýggjum um uppseting av løðistøð á nýggja bústaðnum. Avtalan er galdandi fyri ávísan bústað (matr.nr)

2.2. Um tú flytur, skalt tú gjalda leigu fyri løðistøðina á gamla bústaðnum, inntil løðistøðin er latin okkum aftur, sambært pkt 1.4, um ikki nýggja húskið á gamla bústaðnum hevur yvirtikið leigumálið av løðistøðini, og yvirtøkan er góðkend av okkum.

## 3. Vilt tú avhenda avtaluna.

3.1. Vilt tú avhenda avtaluna, heftir tú framhaldandi, so leingi vit ikki hava góðkent avhendingina.

3.2. Tú kanst bert avhenda avtaluna við góðkenning frá okkum.

3.3. Vilt tú avhenda avtaluna, skalt tú seta teg í samband við kundatænastuna hjá okkum, sum gevur tær upplýsingar um, hvussu avhendingin kann fara fram. Tú kanst ikki avhenda avtaluna, so leingi tú hevur ógoldnar rokningar, har gjaldsfreistin er farin.

# 2. Partur - Viðgerð av persónsupplýsingum v.m.

---

## 4. Skráseting av upplýsingum

4.1. SEV kann krevja, at tú við avtalubyrjan gevur okkum hesar upplýsingar:

4.1.1. Navn og bústað

4.1.2. Bústaðin, har løðistøðin verður staðsett.

4.1.3. Føðidato, skrásetingar nr, V-Tal ella líknandi tá talan er um virkið Sp/f, P/F ella líknandi

4.1.4. Teldupostbústað

4.1.5 Annað sum vit meta viðkomandi fyri viðgerð av umsóknini

4.2. Tú skalt kunna skjalprógva, at upplýsingarnar eru rættar, um vit biðja um tað, t.d. samleikaprógv, skráseting hjá fólkayvurlitinum, skeyti/leigusáttmáli ella annað.

## 5. Viðgerð av upplýsingum, nýtslu- og rokningaupplýsingar

5.1. Vit hava brúk fyri at viðgera upplýsingar um teg, og um, hvussu tú nýtir tænastuna. Vit brúka upplýsingarnar til:

5.1.1. At umsita títt leigumál, ella fáa til vega og viðlíkahalda upplýsingar í sambandi við leigumálið og rokningarnar.

5.1.2. At umsita tær tænastur, tú nýtir, m.a. um nýtslu av løðistøðini, so sum nýtsluhátt, nær løtt verður, elnýtslu og mátt og aðrar upplýsingar um løðing ella avrokning.

5.1.3. At bjóða ella veita møguligar framtíðar tænastur, sum krevja viðgerð av upplýsingum um nýtslu ella staðseting

5.1.4. At kunna halda lógarásett krøv og forða fyri ólógligari nýtslu ella aðrari nýtslu, sum stríðir ímóti avtalugrundarlagnum.

5.2. Vit goyma upplýsingarnar sambært galdandi trygdarreglum, og í mesta lagi so leingi lóggávan loyvir hesum.

5.3. Tú hevur rætt til innlit í teir upplýsingar um teg, sum vit viðgera, við teimum avmarkingum, sum lóggávan ásetur.

5.4. Tú hevur rætt til at mótmæla innsavning av upplýsingum og víðari viðgerð av tínum persónligu upplýsingum. Hetta hevur tó við sær, at vit ikki fáa veitt tær onkrar av okkara tænastum.

5.5. Tú hevur rætt til rættingar í tínum upplýsingum, um tað er neyðugt.

## 3. Partur - Løðistøð

### 6. Uppsetan av løðistøð

6.1. Tú skalt sjálv(ur) fyriskipa og bera kostnaðin av, at løðistøðin verður sett upp av fólki, sum hevur heimild at gera hetta tína vegna og er løggildur elinnleggjari.Tað er eisini tín ábyrgd sum kundi
(a) at møguligar myndugleikagóðkenningar fáast til vega,
(b) at tann, sum hevur ræðisrættin til ognina, góðkennir at løðistøðin verður sett upp, og
(c) løðistøðin verður sett upp sambært galdandi reglum, herundir ta til hvørja tíð galdandi vegleiðing hjá okkum.
Vit kunnu krevja skjalprógv fyri at omanfyri nevndu treytir eru loknar, t.d. skrivlig góðkenning frá eigara ella líknandi skjalprógv.

6.2. Vit verkseta bert løðistøðina um:

6.2.1. Tú hevur virkna jørð í tíni el-innlegging, sambært ta til hvørja tíð galdandi vegleiðing hjá okkum.

6.2.2. Tú hevur neyðugan mátt tøkan í tíni innlegging.

6.2.3. Tú hevur internetsamband, sum ger tað møguligt hjá okkum at samskifta við løðistøðina og stýra løðingini.

6.3. Leysstandandi løðistøð eigur at verða sett, har tað hóskar best í mun til parkering og løðing, vanliga í bilhúsvegg/bilskýli/húsavegg, ella við parkeringsøki við leysstandandi loysn. Løðistøðin er sett á sama matrikkul, sum hon er streymveidd frá.

6.4. Tá løðistøðin skal verksetast, skalt tú tryggja tær, at onkur er heima, og at vit ella okkara montørur hevur ótarnaða og trygga atgongd til at gera avtalaða arbeiðið. Um triðimaður skal geva loyvi, er tað tín ábyrgd at hava loyvi frá rætta viðkomandi, áðrenn arbeiðið byrjar.

6.5. Í sambandi við verksetan kann vera neyðugt at sløkkja fyri elveitingini/internet beinara eitt stutt tíðarbil. Vit fráskriva okkum eina og hvørja ábyrgd fyri avleiðingum av at sløkt verður fyri elveitingini og beinara.

6.6. Eftir verksetan royna vit løðistøðina, fyri at tryggja at henda virkar sum ætlað.

6.7. Hesar ásetingar eru eisini galdandi, um løðistøðin skal takast niður, tí kundaviðurskiftini steðga.

6.8 Vit skulu verða fevnd av (”medforsikret”) bygnings- og brunatryggingini hjá eigaranum av ognini 6.9 Í aðramáta verður víst til 5. part um okkara ábyrgd.

### 7. Um feilur er íkomin

7.1. Um løðistøðin ikki virkar, hevur tú skyldu at boða okkum frá um feilin skjótast tilber. Vit taka ímóti fráboðanum um feilir alt samdøgrið umvegis elbil.fo og tlf nr 346800.

7.2. Tá feilur verður fráboðaður, verður byrjað at leita eftir feilinum skjótast tilber. Um feilur er í skipanini ella løðistøðini, rætta vit feilin skjótast gjørligt og vanliga í vanligari arbeiðstíð (mánadag til fríggjadag kl 8 til16). Um tú ert orsøk til óneyðugt útkall ella óneyðugt arbeiði, til dømis í sambandi við, at bilurin ikki er læstur, vánaligt jørðsamband, løðikaðal er defektur v.m., tilskila vit okkum rætt til at senda tær rokning fyri tað.

7.3. Tú skalt tryggja, at vit við atliti til at finna feilir og rætta hesar skjótast gjørligt, kunnu fáa atgongd til tínar innleggingar á innleggingar-búðstaðnum. Fáa vit ikki ótarnaða atgongd til avtalaðu tíðina, ella arbeiða ella koyra vit á annan hátt til fánýtis, hava vit rætt at senda tær rokning fyri tað.

7.4. Tú hevur skyldu til, í tann mun tað er neyðugt, at hjálpa til í mun til at finna feilir og rætta hesar í tínari innlegging á innleggingarbústaðnum.

7.5. Um tú fráboðar ein feil, og tað vísir seg, at feilurin er í bilinum, løðikaðali, jørðsambandi, ella at feilurin á annan hátt ikki liggur hjá okkum, hava vit rætt at senda tær rokning fyri tað.

### 8. Íbinding av aðrari útgerð enn elbili til løðistøð

8.1. Tú hevur onga heimild at binda aðra útgerð til løðistøðina uttan elbilar ætlaðir til at løða við slíkari løðistøð. Íbinding av slíkum útbúnaði kann hava við sær vanda fyri trygdini. Vit tilskila okkum rætt til at sløkkja løðistøðina, um onnur elektrisk útgerð verður íbundin, enn avtalað. Vit frásiga okkum alla ábyrgd fyri avleiðing av slíkari íbinding.

## 9. Ognarrættur, atgongd til og stýring av løðistøðini

9.1. Vit hava ognarrættin til løðistøðina.

9.2. Tú kanst ikki selja, leiga, seta í veð v.m. útgerðina.

9.3. Eyðmerkið á løðistøðini (slag, framleiðsluupplýsingar og líknandi, sum eyðmerkir løðistøðina), má ikki takast burtur ella málast, ella á annan hátt ávirkast so, at tað ikki kennist aftur. Tú mást heldur ikki á annan hátt gera teg inn á løðistøðina.

9.4. Vit skulu móti samleikaprógvi hava ótarnaða atgongd til løðistøðina til neyðugt eftirlit, royndarkoyring, avlesing og avbrótan. Eyka kostnaður í sambandi við at fáa hesa atgongd áliggur tær. Hóast eftirlit er gjørt av okkum, hevur hetta ikki við sær, at ábyrgdin hjá el-innleggjara ella eigaranum/brúkaranum av innleggingini eftir øðrum reglum heilt ella partvíst kann førast yvir á okkum.

9.5. Tú skal fyriskipa og bera kostnaðin av, at neyðugt internet samband støðugt er til løðistøðina, sum ger tað møguligt hjá okkum at samskifta við løðistøðina og stýra løðingini.

## 10. Reklamatión í sambandi við brek

10.1 Privatir kundar (brúkarar) skulu reklamera skrivliga og innan rímuliga tíð.

10.2 Vinnurekandi kundar skulu reklamera skrivliga og beinanvegin.

# 4. Partur - Prísur, gjald og skuldarbinding

## 11. Prísur og gjaldsviðurskiftir

11.1. Prísir og ómaksgjøld v.m. eru í gjaldskránni fyri leigu av løðistøð. Upplýsingar um galdandi prísir fáast á elbil.fo ella við at venda sær til kundatænastuna.

11.2. Gjald fyri leigu av løðistøð og onnur gjøld sambært gjaldskránni fyri leigu av løðistøð, verða kravd upp saman við elrokningini.

11.3. Um gjaldsfreistin ikki verður hildin, verður renta roknað sambært rentulógini og møguligt rykkjaragjald lagt afturat

11.4 Broyting av treytum í hesi avtalu og gjaldskránni fyri leigu av løðistøð.

11.5 Vit kunnu broyta treytirnar í hesi avtalu og gjaldskránni fyri leigu av løðistøð við 1 mánaða varningi við at boða frá hesum á elbil.fo og á heimasíðu hjá okkum.

# 5. Partur - Slit av avtaluni og endurgjaldsspurningar v.m.

## 12. Mishald

12.1. Um tú munandi misheldur tínar skyldur sambært avtaluni, hava vit rætt til at slíta tína atgongd til løðistøðina.

12.2. Talan er um munandi mishald, um tú, ella onkur, sum tú heftir fyri ella hevur ábyrgdina av:

12.2.1. Hevur givið skeivar upplýsingar, tá avtalan varð gjørd,

12.2.2. um tú ikki upplýsir okkum um broytingar, íroknað bústaðarbroytingar og/ella teldupost

12.2.3. nýtir útgerð, sum ikki er góðkend ella er ætlað at binda í okkara løðistøð, ella ger seg inn á okkara løðistøð,

12.2.4. forðar okkum at fáa atgongd til løðistøðina og ella aðra innlegging við atliti til at finna feil v.m. ella ger atgongdina trupla,

12.2.5. ikki rindar rættstundis

12.2.6. fer í trotabúsviðgerð, endurreising, gjaldssteðg, skuldarsanering, neyðsemju, aðra líknandi viðgerð, ella ert fyri munandi versnaðum búskaparligum viðurskiftum annars,

12.2.7. ella á annan hátt virkar munandi í ósamsvari við avtaluna.

12.3. Vit meta tað sum munandi mishald av avtaluni, um eigarin av ognini, ella ein persónur/virki við brúksrætti til økið, har løðistøðin er innløgd, krevur løðistøðina burturbeinda.

12.4. Um munandi mishald kemur fyri, hava vit heimild til:

12.4.1. At slíta avtaluna beinanvegin,

12.4.2. at seta fram endurgjaldskrav móti tær, um tað hevur tap við sær,

12.4.3. at óvirkja tænasturnar og heinta løðistøðina, og møguliga aðra útgerð,og/ella

12.4.4. nýta aðrar vanligar mishaldsheimildir sambært føroyskum rætti.

## 13. Endurgjaldsábyrgd og ábyrgdaravmarkingar

13.1. Vit hava ábyrgdina av og skyldu og rætt til at royna at bøta um feilir, sum møguliga koma í løðistøðina ella hava við arbeiðið, gjørt av okkum og veitarum, sum arbeiða fyri okkum og fyri okkara rokning.

13.2. Vit hava ikki ábyrgd av fylgiskaðum og óbeinleiðis tapi, so sum tap av vinningi ella inntøku, tap av upplýsingum ella framleiðslu, tap av at tænastan ikki kann nýtast sum væntað, ella tap av at avtala við triðjapart fellur burtur ella verður mishildin og líknandi. Vit hava onga ábyrgd fyri brúkarafeili, feilløðing, virus v.m.

13.3. Vit hava ikki endurgjaldsábyrgd fyri tap, orsakað av avbroti, órógvi ella broytingum av løðistøðum og tænastum í sambandi við tiltøk, sum: (a) verða mett neyðug av tekniskum, viðlíkahalds- og framleiðsluorsøkum ella (b) eru áløgd av myndugleikunum, uttan so at vit hava forsømt at avmarka amparnar av hesum. SEV hevur ikki ábyrgd av tapi vegna myndugleikakrøv, sum koma eftir, at løðistøðin er sett til.

13.4. Vit hava ikki skyldu at veita endurgjald, um so er at ein atburður, sum vit í aðramáta hava ábyrgd av, skyldast viðurskifti uttan fyri okkara ræði, íroknað men ikki avmarkað til: snarljós, torusláttur, streymslit, vatnflóð, eldsbruna, kríggj, flutningsforðing og arbeiðsrættarligar ósemjur, íroknað verkfall og verkbann millum okkara egnu starvsfólk og møguligar veitarar, um vit eru partur av ósemjuni ella ikki, tvingandi kringumstøður (force majeure) annars. Í slíkum støðum hava vit somuleiðis rætt til at útseta avtalað arbeiði. Hetta er eisini galdandi fyri veitarar okkara. Partarnir kunnu ikki seta krav hvør móti øðrum av slíkum av røttum útsettum ella manglandi framdum avtalaðum arbeiði. Um ein ella fleiri tvingandi kringumstøður vara longur enn 30 dagar, hava bæði tú og vit rætt til at siga avtaluna upp.

13.5. Vit hava ikki ábyrgd av framleiðslum ella tænastum, sum ikki eru veittar av okkum.

13.6. Í øllum øðrum førum hava vit ábyrgd samsvarandi vanligum endurgjaldsreglum sambært føroyskum rætti fyri tapi orsaka av gerðum ella óvirkni, sum stendst av atburði, sum hevur ábyrgd við sær, hjá okkum ella nøkrum, sum vit hava ábyrgdina fyri.

## 14. Trætumál og klagur

14.1. Um trætumál tekur seg upp millum teg og okkum um viðurskifti viðvíkjandi avtaluni, kanst tú klaga til okkum. Vit taka vanliga avgerð í sakini seinast 3 mánaðir eftir, at klagan er móttikin, ella í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at vit hava fingið allar upplýsingarnar.

14.2. Kann eitt trætumál ikki greiðast í semju, kann trætumálið leggjast fyri Føroya Rætt.

## 15. Gildiskoma

15.1. Hesar treytir eru galdandi frá 1. juni 2020 at rokna.